

www.oljan.fo

**Jan Müller** 07 - 02 - 2013

# Statoil 200 milliardir í yvirskoti

2012 hildnaðist stak væl hjá norska oljurisanum Statoil. Felagið legði úrslitið fram í morgun, og vísti tað eitt yvirskot uppá 207 milliardir kr fyri skatt og 70 milliardir eftir skatt. Statoil framleiðir góðar 2 milliónir tunnur um dagin og væntar at framleiða 2,5 milliónur tunnur um dagin í 2020, sum felagið hevur sett sær sum mál. Felagið boraði 46 leitibrunnar í fjør og fann olju ella gass í 23 av hesum, og var eitt av teimum altjóða oljufeløgunum, sum fann mest olju í heiminum. Ein av hesum 46 leitibrunnunum varð boraður í Føroyum. Statoil steðgaði við hesi boringini, tí tað leið út á veturin. Felagið boðaði tó frá, at tað fór at taka boringina upp aftur, tá veðrið batnaði. Enn er ikki avgjørt, nær tað verður. Enn er heldur einki at frætta, um úrslitið av boringini gevur positivar ábendingar ella ikki. Føroyski Statoilstjórin, Rúni M. Hansen, hevur áður sagt, at boringin verður tikin upp aftur, men enn er ikki avgjørt, júst nær hetta verður. Tað hevur annars merkt Statoil nógv ta síðstu tíðina, at felagið misti fimm starvsfólk í syrgiliga yvirgangsálopinum í Algeria fyri nøkrum vikum síðani. Forstjórin í felagnum, Helge Lund, hevur verið nógv frammi í norskum og altjóða miðlum í sambandi við álopið, og bæði Jens Stoltenberg, forsætisráðharri og onnur hava róst Statoil fyri, hvussu tey hava handfarið kreppuna og hvussu væl tilbúgvingin hjá felagnum hevur virkað. Mynd Løgmaður Kaj Leo Holm Johannessen, Johan Dahl, landsstýrismaður í oljumálum og Rúni M. Hansen, stjóri í Statoil her saman við Helge Lund, forstjóra í Statoil á ráðstevnu í Stavanger í fjør. Mynd oljan.fo/Jan Müller